# Hevur Havnin tað gott hava Føroyar tað gott



*Fundur við miðfyrisitingarstjóran hjá Tórshavnar Kommunu – skrivarin deilir pappír út*

**Hann er altíð upp á vakt, um landspolitikkararnir finnast at Havnini. Hann verjir borg, og hevur sínar heilt greiðu meiningar, tá tosað verður um kommunala útjavning ella ætlanir um at flyta almenn arbeiðspláss úr Havnini. – Hevur Havnin tað gott, hava allar Føroyar tað gott. Hevur Havnin tað hinvegin ikki gott, gongur tað út yvir alt landið, sigur borgarstjórin í Havn, Heðin Mortsen, sum Sosialurin slapp við til arbeiðis ein hálvan mikudag um mánaðarskiftið**

– Eg veit ikki rættiliga, hvat eg haldi um landspolitikkararnar, sum sita í løtuni, men onkrir teirra hava verið eitt sindur óhepnir í sínum gerðum og úttalilsum.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, hyggur upp. Spurningurin um landspolitikkararnar hevur fingið hann at hugsað eitt sindur djýpri enn tá prátað varð um ólavsøkuna ella tey hundraðtals slipsini hjá honum.

– Havnin verpir í dag gullegg, og tí skilji eg ikki teir landspolitikarar, sum vilja drepa hesa hønu, sum er til so stórt gagn fyri alt landið, leggur hann síðani afturat.

## Ladar battarí í døgurðasteðginum

Heðin er einsamallur í fundarhølinum eina løtu. Tað er ikki oftari enn so.

– Eg plagi at seta meg inn her, tá tíðindini eru. Tað er so friðarligt, tí tá eru tey flestu í Posthúskjallaranum og fáa sær ein bita, sigur hann og skrúvar útvarpstólið eitt sindur harðari frá.

Tað snýr seg um almennan stuðul til røktarheimspláss í tíðindunum, og so fáa landsmyndugleikarnir eina lítla viðmerking afturat við á vegnum.

– Misskil meg ikki. Eg havi ein fínan dialog við landsmyndugleikarnar, men tað er ofta ein kampur, leggur hann afturat.

Tað eru seks tímar síðani Heðin fór upp. Eitt korter til sjey var hann á Tórsbreyt og rann nakrar umgangir, og síðani trý korter til átta hevur hann verið á skrivstovu síni í Gamla Kommunuskúlanum. Nú etur hann nakrar fruktir og lurtar eftir tíðindunum, men tað er ikki so nógv sjálvi tíðindini, sum er tað sum telur. Tað er løtan. Fríløtan, sum skal til á miðum degi, fyri at borgarstjórin eisini skal orka at halda ferðina seinnapartin. Tí ferð er á alla tíðina.

– Hevði tað verið nakað, sum æt DAMP, tá eg var lítil, hevði eg sikkurt fingið ta diagnosuna, tí mær dámar als ikki at sita í frið, sigur hann og sløkkir útvarpið, tá kunngerðirnar eru lidnar.

## Nýtt og gamalt

Á skrivstovuni hjá borgarstjóranum, sum ikki er so stór, sum mann kundi ímyndað sær, hanga fleiri málningar, umframt at model av fleiri standmyndum hjá kommununi standa á borðum og hillum. Málningarnir eru bæði gamlir og nýggir. Har er ymiskt frá Waagstein via Ingálv av Reyni til Tórbjørn Olsen. Men tann, sum kanska hóskar seg best til borgarstjóra-skrivstovuna er ein málningur frá 1932 av Bent Restorff. Hann ímyndar Kongabrúnna, og er málaður í 1932.

Á skrivaraborðinum stendur eisini ein ramma við smáum myndum av familjuni. Konan Hjørdis ovast og so børnini og abbabørnini niðureftir.

Heðin Mortensen er altíð væl klæddur, men har er eisini eitt sindur av klæðum at velja í har heima.

– Eg má siga sum er, tað er konan Hjørdis, sum hjálpir mær við klæðunum, og tað er sum oftast hon, sum velur, hvat eg skal fara í, sigur Heðin og sær eitt sindur foyur út.

Men hann mannar seg upp og leggur afturat:

– Tað er væl soleiðis hjá øllum pørum, at annar parturin er betri til okkurt enn hin, og hjá okkum er tað altso Hjørdis, sum hevur best skil á klæðum – bæði sínum egnu og mínum, so er tað sagt. Men eg dugi so ymiskt annað húsligt, sigur hann síðani smílandi.

Og har er eins nógv at halda skil á hjá Hjørdis. Heðin eigur eini 30 klæðningar, meira enn dupult so nógvar skjúrtur, og so eru tað slipsini.

– Tey havi eg ikki tal á, men har eru væl fleiri hundrað eftirhondini. Eg fái meg ikki at blaka nøkur av teimum burtur, tí tey siga øll eina søgu. Eina søgu um sína tíð, fortelur Heðin, og tankarnir flákra eitt sindur. Kanska aftur til tað fyrsta slipsið, sum ivaleyst er frá einaferð fyrst í 60-árunum.

## Tríggjar fundir í senn

Hesin arbeiðsdagurin hjá Heðini er ikki av teimum vanligu. Tað eru eingir formligir fundir í nevndunum hjá býráðnum. Annars eru teir fundirnir ofta, og tá kemur tað meira enn so fyri, at Heðin rennur millum tey bæði fundarhølini, sum eru við stjórnarskrivstovurnar á Vaglinum.

Í dag heldur hann seg til fundarhølið í hølinum út ímóti Tinghúsinum. Har er hampiliga gott pláss, so leingi talan ikki er um alt ov nógvar fundarluttakarar.

Og tað gongur væl at fáa tingini frá hondini.

– Eg vil ikki hava nakað skelti, sum ikki er á føroyskum.

Heðin heldur fund við tvey av embætisfólkum sínum um plasering av teimum ymsu tiltøkunum á Ólavsøku. Hann er sjálvur við, tá tær 70 umsóknirnar skulu viðgerast, og tað heldur hann ikki vera løgið.

– Sum borgarstjóri í Havn varði eg av og havi ábyrgdina av Ólavsøkuni, og tí má eg eisini vera við í fyrireikandi arbeiðinum, svarar hann, tá hann verður spurdur, um arbeiðið hjá borgarstjóranum ikki kunnu blíva í nágreiniligt.

– Einki skelti, har tað stendur «Pandekagehus«. Har skal standa »Pannukøkuhús« ella einki, sigur hann, og embætisfólkini eru samd.

Hurðin gongur og inn kemur fyriskiparin av Asfalt-tiltakinum. Heðin og hann førka seg yvir til hin endan á borðinum, og meðan

*Framhald á næstu síðu*



*Ólavsøkan á Skálatrøð verður fyrireikað*



*Asfalt skal leggjast til rættis*



*Til handilsmóttøku saman við varaborgarstjóranum*

»Hevði tað verið nakað, sum æt DAMP, tá eg var lítil, hevði eg sikkurt fingið ta diagnosuna«.
Heðin Mortensen, borgarstjóri

»Har skal einki skelti standa við Pandekagehus. Tað skal standa Pannukøkuhús ella einki«.
Borgarstjórin fyrireikar Ólavsøku

»Tey havi eg ikki tal á, men har eru væl fleiri hundrað eftirhondini«.
Borgarstjórin um slips síni